# Braquet hita upp fyri Petra



*Tað verður Braquet, sum skal hita upp, tá Petra fer at hava konsert í Fuglafirði týsdagin*

Tá Petra í komandi viku hevur konsert í Fuglafirði, verður tað Braquet, sum skal hita áhoyrararnar upp.

Upphiting fyri ein góðan bólk hevur minst tvey endamál. At geva upphitaranum ein góðan pall og at fáa tað besta burtur úr sambandinum millum høvuðsnavn og áhoyrara. Braquet hava fótað sær í Føroyum, men hava ikki toppað enn. Og verri enn so. Fyrsta fløgan kemur út nú, og hon verður helst til sølu á konsertini týskvøldið.

Arni Zachariassen er guittarspælari í Braquet, og hjá honum verður týskvøldið í øllum førum heilt serligt. Arni er gamal Yngwie Malmsteen fan, men Arni sigur, at rokkurin, sum teir spæla, er meira modernaður enn tað. Kanska í slekt við nýggja metalið.

Arni sigur, at tónleikalívið hjá sær byrjaði, tá hann var seks ár. Hann fekk eitt kassettuband við blandaðum kristnum tónleiki. Har vóru Steve Green, Michael W. Smith og Petra, millum onnur. Arni fall fyri Petra og hevur ikki hugt aftur um seg síðan. Michael W. Smith og Steve Green kunnu vera góðir fyri onkran annan, men Petra spæla rokk, og tað var rokk, Arni vildi hava. Hann hevur ikki hingið í Petra øll árini, men tað er eitt sum eitur fyrsti kærleikin, og hann er sterkur í tónleikinum.

Braquet hava verið til í knapt fýra ár. Teir eru Andrias Højgaard (sang), Jóhan á Lakjuni (trummur) og Leivur Vitalis (bass) og Arni Zachariassen (gittar). Andrias skrivar orðini, sum hann syngur, og tey eru ensk orð.

## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið hækkar hann upp í norðan. Sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig fríggjanáttina um frostmarkið.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av suðri, sunnudagin snarar hann í landsynning. Leygardagin yvirhøvur turt, men sunnudagin regn. Hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 15 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 16 |
| Athen | -- |
| Malta | 14 |
| Tunis | 9 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 22 |
| New York | 12 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 974 hPa. eystan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Norska Havinum fer spakuliga norðureftir og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/4 kl. 06[00]– 12/4. 06[00]. Hitin í gjár: 6,7°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 11,0 mm – mált frá 11/4 kl. 06[00]– 12/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 57,9 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

13. apríl

8. apríl Tendring
16. apríl Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13.apríl | 10.55 | 23.20 | 09.55 | 22.20 | 10.10 | 22.35 | 00.30 | 12.55 | 01.30 | 13.55 | 09.10 | 21.35 | 08.10 | 20.35 | 11.10 | 23.35 | - | 12.10 | 10.40 | 23.05 | 11.55 | - |
| 14.apríl | 11.46 | - | 10.46 | 23.12 | 11.01 | 23.27 | 01.20 | 13.46 | 02.20 | 14.46 | 10.01 | 22.27 | 09.01 | 21.27 | - | 12.01 | 00.35 | 13.01 | 11.31 | 23.27 | 00.20 | 12.46 |
| 15.apríl | 00.12 | 12.38 | 11.38 | - | 11.53 | - | 02.12 | 14.38 | 03.12 | 15.38 | 10.53 | 23.19 | 09.53 | 22.19 | 00.27 | 12.53 | 01.27 | 13.53 | - | 12.23 | 01.12 | 13.38 |
| 16.apríl | 01.04 | 13.42 | 00.04 | 12.42 | 00.19 | 12.57 | 03.04 | 15.42 | 04.04 | 16.42 | 11.57 | - | 10.57 | 23.35 | 01.19 | 13.57 | 02.19 | 14.57 | 00.49 | 13.27 | 02.04 | 14.42 |
| 17.apríl | 02.20 | 14.54 | 01.20 | 13.54 | 01.35 | 14.09 | 04.20 | 16.54 | 05.20 | 17.54 | 00.35 | 13.09 | - | 12.09 | 02.35 | 15.09 | 03.35 | 16.09 | 02.05 | 14.39 | 03.20 | 15.54 |

5 707265 100036 >